# Áheitan á Kringvarp Føroya

UNI NÆS

formaður, Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag



Nú arbeitt verður við vetrarskránni hjá Kringvarpi Føroya, loyva vit okkum í “Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag” (KLH) at koma við hesum skrivi til leiðsluna í Kringvarpinum.

**KLH – endamál og virki**
KLH hevur gjøgnum tíðirnar gjørt vart við viðurskifti í sambandi programmvirksemið hjá Kringvarpinum.

KLH hevur í endamáli sínum

- at virka fyri kristiligum sendingum í útvarpi og sjónvarpi, sum t.d. gudstænastum, kristiligum fundum, andaktum, kristiligum sangi og tónleiki, tíðindum frá kristiligum arbeiði o.t.l.
- at stýðja útvarp og sjónvarp í góðum og sømiligum sendingum,
- at mótarbeiða, at útvarp og sjónvarp verða nýtt til ósømiligar sendingar og annað, sum ikki er kristnum siði og kristnari trúgv verdugt.

**Dialogur við Kringvarpið**
Í fimti ára søgu felagsins hevur KLH við millumbili havt samband við leiðslu kringvarpsins, tá ið tað er talan um kristiligt og mentanarligt tilfar, sum hevur verið borið fram í almennu loftmiðlunum. Sigast kann, at dialogur hevur verið, men vit halda, at sjónarmið okkara í alt ov lítlan mun hava vunnið frama hjá leiðsluni í kringvarpinum gjøgnum árini.

Hóast hetta fegnast KLH um tað kristiliga tilfarið, sum hevur verið sent gjøgnum tíðirnar í kringvarpinum.

Av tilfari, sum hevur verið fastur táttur, kann m.a. verða nevnt: Gudstænasta/Evangeliskur fundur, Morgunlestur og Hetta heilaga evangeliið skrivar og Gudstænasta/Møti og Andakt í sjónvarpinum. Aðrar sendingar hava eisini verið gjøgnum árini t.d. Sálmar og Sangir og Víngarðurin. Eisini kann nevnast sendingin Tilvera og aðrar mentanarligar upplýsandi sendingar.

**Stórur áhugi fyri kristiligum tilfari**
Tað er alment kunnugt, at áhugin fyri kristiligum sendingum er stórur millum fólk. Hetta vísa eisini lurtara- og hyggjarakanningar, sum kringvarpið hevur gjørt gjøgnum tíðirnar.

Hesi seinastu árini er senditíðin hjá kringvarpinum økt í stórum – serliga hjá útvarpinum. Á tøkniligu síðuni er kringvarpið eisini nógv útbygt, nú sent verður talgilt og kringvarpið veitir størri og størri tænastur til hyggjaran og lurtaran við t.d. interaktivum sendingum og netvarpi, eins og brúkarin hevur størri og størri atgongd til “gamalt” tilfar, sum liggur á netinum. Alt hetta eru stór framstig sum vit í KLH fegnast um, og sum er til stóra gleði fyri brúkaran.

KLH ásannar, at tað hendir nógv á øllum økjum í samfelagnum, og kringvarpið skal náa nógv við tíðindum og kunning um alt, sum hendir bæði her á landi og burturi í heimi.

**Lítil menning og færri sendingar**
KLH ásannar eisini, at kringvarpið *ikki* hevur ment táttin av kristiligum tilfari seinastu mongu árini – heldur mega vit ásanna, at útboðið av kristiligum sendingum er minkað.

Tað er ein royndur lutur, at kristiliga virksemi er stórt í Føroyum, og vit í KLH halda, at hesin tátturin í mentanararvinum hjá okkum føroyingum eisini eigur at hava góða rúmd í almenna kringvarpinum.

KLH heitir tí á leiðsluna í kringvarpinum og tey, sum hava ábyrgdina av at skapa og menna tilfar í kringvarpinum at virka fyri betri rúmd fyri kristiligum og mentanarligum tilfari í Kringvarpi Føroya.

Vit loyva okkum at koma við hesum ítøkiliga uppskoti:

**Sunnu- og halgidagar í Kringvarpinum**
Vit mæla til, at tilfar verður gjørt, sum ber brá av at tað veruliga er sunnu- og halgidagur. Vit hugsa ikki bert um ta vanligu gudstænastuna/evangeliska møti, men eisini t.d. um góðar sálmar og sangir, góðan tónleik, samrøður, tíðindi og reportasjur frá kristiliga arbeiði og barna- og ungdómssendingar við kristiligum innihaldi.

**Høgtíðirnar**
Vit mæla til, at tilfar verður gjørt, sum hóskar at bera fram í útvarpi og sjónvarpi til tær ymisku kristiligu høgtíðirnar í árinum. Danska TV2 hevur gjørt av at endursenda vælumtókta jólakalendaran “Jesus og Josefine”. KLH heitir á kringvarpið um eisini at senda “Jesus og Josefine” í SVF frá 1. desember í ár.

**Morgunlesturin**
Ónøgdin er framvegis ógvuliga stór millum fólk, at morgunlesturin ikki verður endursendur. KLH hevur fleiri ferðir bæði munnliga og skrivliga heitt á leiðsluna í kringvarpinum at fáa morgunlesturin aftur á skránna – higartil uttan úrslit. Vit heita enn einaferð um at fáa morgunlesturin á skránna kl.09.50.

Vit fegnast um, at morgunlesturin nú verður endursendur í SVF, og at Kringvarpið er farið undir at gera nýggjar upptøkur av sálmum og sangum m.a. at brúka í morgunlestrinum.

**Sjónvarpið**
Vit mæla til, at fleiri familjufilmar við kristiligum og uppbyggjandi innihaldi verða settir á skránna í sjónvarpinum – eisini við góðum filmum fyri børn – yngri og eldri.

Vit heita eisini leiðsluna um at hava fleiri kjaksendingar um etikk og moral í síni breidd, men eisini við atliti til okkara egnu mentan og siðvenju á kristiligum støði. KLH heitir eisini á leiðslu kringvarpsins um at fáa allar sendingar í sjónvarpinum tekstaðar.

**Gott og fjølbroytt kringvarp**
Kringvarp Føroya hevur eitt stórt starvsfólkalið við nógvum og fjølbroyttum møguleikum. KLH fegnast eisini um, at leiðslan í kringvarpinum hevur sett eitt av starvsfólkunum sum samskipara av kristiliga tilfarinum í kringvarpinum.

Málið hjá okkum øllum er at fáa eitt gott og fjølbroytt Kringvarp Føroya. KLH vil fegið vera við at gera hetta málið til veruleika, og ynski okkara er at hava ein opnan dialog við leiðslu og starvsfólk í kringvarpinum.

# Hans Pauli Strøm drítur í egið reiður

BJØRN KALSØ



**Í afursvari til mín, heldur Hans Pauli Strøm á við ógrundaðu álopunum á Sambandsflokkin og fyrru ABC samgonguna, sum hann sjálvur var partur av. Gamalt var annars, at tað er vánaligur fuglur, ið drítur í egið reiður. Tí átti HPS at vent kanónunum aðrar vegir**

Javnaðarflokkurin hevur avblást klassastríðið, er komin við uppskoti um sparingar á pensiónsøkinum á 25 mió. kr. við at hækka pensiónsaldurin og mótrokna frá fyrst tjentu krónu í pensiónini. Neyvan tað javnaðarveljarin hevði væntað. Tí sær veljarakanningin, sum hevur gjørt HPS í ørviti, ivaleyst út, sum hon ger.

Sambandsflokkurin hevur roynt at fingið Javnaðarflokkin frá hesi vandakós. Tí átti Hans Pauli at vent kanónunum, og annaðhvørt funnið sær annan syndabukk, ella hildið uppat við tvítnu skrivingini.

Atburðurin hjá HPS í løtuni minnir ikki sørt um atburðin hjá Høgna Hoydal á Fólkatingi, har hann í áravís hevur gingið og roynt at sparka opnar hurðar inn.

**Positivlistin hjá HPS er fyri tað mesta bluff**
Í hvørji einastu grein hjá HPS verður borðreitt við einum positivlista yvir egin avrik, við eftirfylgjandi lista yvir vánalig avrik hjá øðrum. Positivlistin er tó fyri tað mesta bluff. Tí tað er útgjaldið úr Samhaldsfasta, sum ger at penionistar fáa meira pening útgoldnan nú enn fyri fýra, fimm árum síðan.

Samhaldsfastið er ikki ein pensión, men heldur ein skipan, har allir borgarar og arbeiðsgevarar rinda í grunn, alt eftir inntøku og lønargjaldingum. Skipanin hevur einki við landskassan at gera.

Sostatt eru ikki teir stóru batarnir hendir á pensiónsøkinum, soleiðis sum HPS annars breggjar sær av.

**Hvar er negativlistin hjá HPS?**
Ja men Harragud, ein er noyddur at fregnast eftir negativlistanum hjá HPS sjálvum, tað er jú upplagt:

- Hvussu við læknavaktini í Norðoyggjum, pørtum av Eysturoynni og vesturi í Vágum, har sjúklingurin hevur fingið eina verri tænastu?
- Kommunulæknaskipanini sum heild, har stórur partur av størvunum eru ómannað, til miklan ampa fyri sjúklingar?
- Kostnaðarmiklu multistjóraætlanirnar innan sjúkrahúsverkið?
- Órímuliga langa viðgerðartíðin í samband við umsóknir at gerast fyritíðarpensionistur, har tað mangan tekur fleiri ára óviriligt stríð, hjá illa støddum borgarum, bara at verða hoyrd.
- Nógvu feilkeypunum av illa egnaðum bygningum til bústovnar, sum kosta skattgjaldarunum tíggjutals óneyðugar milliónir?
- Ovurhonds luksusdýru og lítið javnaðarsambarligu ellis- og røktarheimsætlanini við tilhoyrandi heimi til sinnisveik í Vági? ….

Nei, størri játtanir og pengabrúk nýtast ikki at merkja betri tænastur. Tvørturímóti er upptakið hjá Rósu og Aksel ikki, sum at siga tað! Ei dáni í, at onkur mistøk henda á vegnum, nú skil aftur skal fáast á.

**Hans Pauli pellar um skattalættar**
Sambandsflokkurin royndi at fáa Javnaðarflokkin at skifta kós og ganga frá skattalættanum, sum skuldi latast í seinnu helvt av valskeiðnum 2004 – 2008. Javnaðarflokkurin vildi ikki, og valdi heldur at fylgja skattapolitikkinum hjá Fólkaflokkinum. Avtala fekst tí bert um at minka ætlaða skattalættan við einum triðingi. So HPS, syrgiligi sannleikin er, at Javnaðurin setti skattalættar fram um pensionistar.

At dagføra skattastigan í fyrru helvt av valskeiðnum 2004 – 2008 var annars í lagi av tveimum orsøkum:

- at sleppa miðalinntøkum undan brandskatting av seinast vunnu krónunum
- og fyri at seta ferð á búskapin.

Mitt í skeiðnum, tá hjólini aftur vóru farin at mala, hevði tó verið rætt at slept skattalættanum. Men Sambandið stóð tá tíverri einsamalt.

So, HPS pellar, tá hann leggur okkum onnur undir at tvíhalda um skattalættar, heldur enn at raðfesta pensionistar.

**Hósat munnkurv, flúgva fundarfrásagnir um geilar**
Sjálvt um HPS hevur álagt sær sjálvum munnkurv í pensiónsmálum, er sum at stoyta úr eplasekki, nú góða viku eftir múlabandið. Munnkurvin man vera skrædnað, tí fundarfrásagnirnar ferðast, sum eldur í uppturkaðum berjalyngi umvegis tíðindastovur, portalar og bløð. Men heldur ikki her kemur allur sannleikin fram. Tað ljóðar, at allar ólukkur koma frá embætisfólki og øðrum politiskum flokkum, meðan HPS sjálvur stendur, sum drangur í brimi og verjir pensionistarnar.

Makan til óseriøsitet og nalvaskoðan skal ein leita við luppi eftir.

Nú fundarfrágreiðingarnar kortini flúgva um geilar, átti Hans Pauli heldur at greitt fólki frá fundinum, tá Sambandflokkurin í fyrru ABC, um hálvan róður, kom við kravinum um at strika seinna part av ætlaða skattalættanum.

**Pensiónin ikki lækkað**
Tá HPS enn einaferð fær tað at ljóða, sum um pensiónirnar eru lækkaðar í seinnu ABC samgonguni, so er tað framvegis ikki rætt. Viðbøturnar til pensiónina eru hækkaðar við javningini á 3%.

**Heilivágur**
Broytingarnar, sum eru gjørdar viðvíkjandi heilivági eru órógvandi, og í ávísum førum beinleiðis óhepnar. Spurningurin má tí takast upp í samgonguni og skeivleikar rættast.

Løgið tykist tó, at HPS so vítt eg, og onkur annar við, kunnu minnast, ongantíð talaði at uppskotinum, tíansheldur ávaraði samgonguna um vansarnar, tá hann sat í landsstýrinum. Hugsi tað ikki vera at fara ov langt, tá sagt verður, at HPS hevur havt ein fingur við í spælinum og beinleiðis talað fyri.

Ikki fyrr enn HPS var noyddur at fara úr landsstýrinum í Løgtingið orsaka av yvirnýtslu, fekk pípan annað ljóð, og maðurin byrjaði at tala at.

Kanska orkaði HPS ikki at gera um seg í landsstýristíðini orsakað av eini óhepnari samanblanding millum heilsurenningar og ov nógvari vegitabilskari føði. Ella vildi hann kanska fyri einhvønn prís halda fast við landsstýrissessin. Eitt er tó vist, trísifraðu milliónirnar, ið vórðu brúktar uttan heimild, høvdu verið góðar at gjørt gott við í hesum døgum.

**Neyðugt at hyggja frameftir**
Fari tó fyri hesaferð at gevast við skrivingini um markátligu samstarvsuppleggini á pensiónsøkinum hjá Javnaðinum og Hans Paula Strøm. Frægast man hóast alt vera at líta fram-eftir, fara í arbeiðshandskarnar og royna at finna góðar og neyðugar loysnir.